# Synopsa til munnliga próvtøku í fólkaskúlanum

| |
|---|
| **Navn** NN-04 |
| **Flokkur og skúli**<br>9. flokkur, NN skúli |
| **Lærugrein og lærugreinastig**<br>Føroyskt, fráfaringarroynd fólkaskúlans |
| **Fyrireiking í bólki? ja ☐ nei ☐**<br><br>**Um ja, hvørji eru hini í bólkinum?** |
| **Hugdýpingarøki** - *hugdýpingarøkið, sum næmingurin hevur fingið við lutakasti.*<br><br>Yrkingar í tíðarskeiðinum 1978 – 1998 |
| **Tilfar í hugdýpingarøkinum** - *lisnir tekstir, myndir, filmar o.a., sum flokkurin hevur gjørt av, skulu vera við í hesum hugdýpingarøki.*<br><br>Morgun (1993): *Martin Joensen*<br>Sekstan ár (2002): *Jóanes Nielsen*<br>Vakrari enn Havnarvág er orðið pápi (1984): *Jóanes Nielsen*<br>Til Boga og allar nýføðingar í verðini (1978): *Jóanes Nielsen*<br>Tá tú missir teg sjálvan burtur (1998): *Jóanes Nielsen*<br>Kalli Katt (1979): *Kári P.* |

**Synopsan er latin inn tann ______________________________________**

**Undirskrift næmingsins: ______________________________________**

**Frágreiðing um próvtøkuuppleggið og grundgeving fyri val av hesum**
*- stutt frágreiðing um próvtøkuuppleggið og hví tað er valt (próvtøkuupplegg kann vera tekstur, filmur, mynd ella annað, sum næmingurin sjálvur hevur valt at viðgera).*

Eg havi valt yrkingina "Lívini" eftir Sigri M. Gaïni, tí at hon er skrivað innan fyri tíðarskeiðið 1978-1998, og at hon tí kann bólkast undir mítt hugdýpingarøki, men eisini tí at hon kann samanberast við nakrar av teimum yrkingum, vit hava lisið í føroyskum, sum eru bólkaðar undir hesum sama hugdýpingarøki. Her meini eg serliga við yrkingina "Sekstan ár" og "Tá tú missir teg sjálvan burtur" eftir Jóanes Nielsen, tí tær viðgera tað at vera ungur og gerast vaksin og kunnu setast í samband við heimsspekingarliga og trupla hugtakið tíð, sum eisini er eitt evni í próvtøkuupplegginum. Hetta evnið er sera áhugavert, m.a. tí at vísindafólk eru enn í iva um, hvussu tíð riggar.

Eisini er henda yrking eitt gott dømi um, hvussu yrkingar verða skrivaðar í dag, tí at hon ikki hevur rím og vers o.s.fr

**Framløguætlan fyri munnligu próvtøkuna** *- skrá ella ætlan, sum vísir, hvussu næmingurin heldur, at próvtøkan skal fara fram.*

- At lesa upp
- Eitt sindur um skaldið
- Hví valdi eg hesa yrking?
- Greining og tulking
- Viðgera tað at gerast eldri og tíð sum heild

**Lýsing av greining og tulkingarøkjum** - *næmingurin greiðir frá greining og tulkingarøkjum, sum hann hevur valt at viðgera.*

Eg taki støði í einum greiningarfrymli fyri yrkingar.

- Heiti
- Evni
- Innihald
- Persónar
- Frásøgufólk
- Mál og stílur
- Frásjónargerð

**Tulking**

- Hvat fær hetta meg at hugsa um?
- Hvat undrist eg um?
- Hvat dámar mær, og hvat dámar mær ikki?
- Hvat man skaldið hugsa?

**Lýsing av frásjónarøkjum (perspektivering)** - *næmingurin vísir her á tekstir, filmar og/ella annað tilfar úr hugdýpingarøkinum, sum próvtøkuuppleggið kann setast í samband við*

Eg samanberi yrkingina "Lívini" eftir Sigri M. Gaïni við "16 ár" og "Tá tú missir teg sjálvan burtur" eftir Jóanes Nielsen, tí at tær allar tríggjar viðgera tað at gerast vaksin, at tíðin fer. Bæði "16 ár" og "Tá tú missir teg sjálvan burtur" snúgva seg um ein, sum lítur aftur á sínar ungu dagar, har hann hevur verið fyri bæði góðum og ringum hendingum.

**Áseting av stykki til upplestur** - *næmingurin vísir á, hvat hann vil lesa hart úr próvtøkuuppleggnum (uml. 1/3 normalsíða). Er próvtøkuuppleggið ikki ein tekstur, velur lærarin stykki til upplestur.*

Eg lesi yrkingina upp.

**Keldulisti** – *keldur (bøkur, netsíður o.a.), sum hava verið nýttar í fyrireikingini av synopsuni.*


- "16 ár": Nielsen, Jóanes: *Brúgvar av svongum orðum* (2002): Mentunargrunnur Studentafelagsins
- "Tá tú missir teg sjálvan burtur": Nielsen, Jóanes: *Pentur* (1998): Mentunnargrunnur Studentafelagsins
- "Lívini": Gaïni, Sigri M.: *Orð og Andlit* (1997): Fannir
- "Yrkingagreining": Við bókini *En modell för lyrikanalys* (1970) sum fyrimynd eftir Gösta Löwendahl.